# Steypakappingin er nú h

Tá ið GÍ á Ólavsøku fyri sætttu ferð vann steypafinaluna, løgdu teir seg á næstfremsta plássið í steypasigrum. HB hevur vunnið fleiri ferðir enn øll hini tilsaman í teimum 50 finalunum, ið higartil eru spældar í kappingini, sum fyrstu árini grulvaði og stetlaði, men sum nú verður mett at vera týdningarmikil



*GÍ. Steypavinnari 2005. Aftanfyri frá vinstru: Svenn Olsen, Símun Louis Jacobsen, Hanus Jacobsen, Hans Pauli Petersen, Hans Gregersen, Leivur Hansen, Bjarni Justinussen, Per Jacobsen, Álvur Joensen. Frammanfyri frá vinstru: Sunvard Joensen, Sámal J Henning Jacobsen. Venjarin, Krzystof Popczynski, og hjálparvenjarin, Pauli Jarnskor, eru ikki á myndini. Seinnu árini hevur tað umhugsað, um ikki FSF á ávísum staði og við tí bakgrundini, sum FSF heldur vera tað røttu, syrgdi fyri, at almenn liðmynd va*

STEYPASØGA
*Jóannes Hansen*

Steypafinalan í fótbólti í 2005 var søgulig. Tað eru 50 ár síðani, at tað varð farið undir steypakappingina, og finalan hesa ferð var tann 50. í hesa hálvu øldina.

Um finalur høvdu havt verið spældar á hvørjum ári, so hevði finalan hesa ferð sjálvandi havt verið tann 51.. Men í 1970 varð eingin finala spæld. HB og KÍ høvdu kvalifiserað seg til endauppgerðina, men tá ið tað ikki fekst semja um, hvar finalan skuldi spælast, so strikaði ÍSF, sum tá hevði ábyrgdina av fótbóltinum, finaludystin.

Fyrsta steypakappingin var í 1955. Tá varð spælt um Ísafjarðarbikarið. Í 1965 varð farið undir kappingina um fyrstu Ísafjarðarsúluna, og fram til og við 1988 varð spælt um tríggjar súlur. Síðani hevur verið spælt um Løgmanssteypið.

HB hevur verið nógv tað besta steypaliðið. Havnar Bóltfelag hevur vunnið steypakappingina 26 ferðir ella oftari, enn øll hini feløgini tilsaman hava vunnið kappingina. HB hevur vunnið Ísafjarðarbikarið, tríggjar Ísafjarðarsúlur og eitt Løgmanssteyp til ognar.

Næstbesta steypaliðið er nú GÍ við seks finalusigrum. KÍ og TB hava vunnið fimm ferðir, B36 hevur vunnið fýra ferðir. Hinir vinnararnir hava verið NSÍ, sum hevur vunnið tvær ferðir, og VB og B71, sum hava vunnið eina ferð í part. Hvussu stórur HB leikluturin hevur verið í steypakappingini, sást eisini aftur í, at teir umframt at hava vunnið 26 ferðir, níggju ferðir hava verið tapandi finaluliðið. HB hevur altso verið annar parturin av 35 av teimum hálvt hundrað finalunum!

## Ásetingarnar og gongdin

Reglurnar fyri steypakappingina hava verið tær somu øll árini. Ásetingarnar hava sagt, at kappingin um steypið er í tíggju ár, og at tað felagið, sum eftir tíggju ár hevur vunnið oftari enn hini feløgini, hevur vunnið steypið til ognar. Um eitt felag, áðrenn tíggju ára skeiðið er runnið, hevur vunnið so mikið ofta, at tað ikki er møguleiki hjá øðrum felag í tíggju ára skeiðnum at vinna fleiri ferðir enn hetta felagið, so er kappingin lokin.

Um einki felag hevur vunnið fleiri ferðir enn okkurt annað felag, tá ið tíggju ára skeiðið er runnið, verður hildið fram við kappingini, inntil eitt felag hevur vunnið fleiri ferðir enn nakað annað felag. Higartil hevur ikki verið neyðugt at nýta hesa regluna.

Fyrsta kappingin var í tíggju ár. Tá hevði HB vunnið seks ferðir og TB fýra ferðir. Onnur kappingin var í níggju ár. Tá er 1970, tá eingin finala varð spæld, roknað uppí. HB vann kappingina um fyrstu súluna fimm ferðir.

Styttsta kappingin var tann um aðru súluna. Hon var í sjey ár. Tá hevði HB vunnið fimm ferðir, og tá ið VB og TB harafturat høvdu vunnið eina ferð í part, bar tað ikki nøkrum felag til at fáa HB aftur.

Kappingin um triðju súluna var í átta ár, áðrenn HB hevði vunnið fimm ferðir og harvið súluna til ognar, tí GÍ hevði vunnið tvær ferðir og NSÍ eina ferð.

Kappingin um fyrsta Løgmanssteypið var í tíggju ár. Tá ið hon var lokin í 1998 hevði HB vunnið fýra ferðir, KÍ og GÍ høvdu vunnið tvær ferðir í part, og B36 og B71 áttu hvønn sín lut í steypinum.

Síðani 1999 hevur verið kappast um annað Løgmanssteypið. Kappingin verður liðug í 2008. Higartil hava B36 og GÍ vunnið tvær ferðir, og KÍ, NSÍ og HB hava vunnið eina ferð í part. Trý kappingarár eru eftir at stríðast í. Hóast HB er verri fyri hesa ferð, enn teir hava verið í øllum hinum fimm kappingunum, so hava teir framvegis møguleika at ogna sær annað Løgmanssteypið.

Fýra feløg hava verið í finalum, uttan at tað hevur eydnast teimum at vinna steypakappingina. ÍF tapti á Ólavsøku fjórðu finaluna. Í 1975, 1982 og í 1987 taptu teir móti HB, og hesa ferð taptu teir móti GÍ. ÍF hevur spælt seks finaludystir. Í 1975 spældu teir bæði á heimavølli og útivølli móti HB, í 1982 spældu teir eina finalu móti HB, og í 1987 var neyðugt við umdysti, áðrenn ÍF, sum hetta árið spældi í 2. deild, hevði yvirgivið seg til HB.

Hvalbingar vóru í finaluni í 1983, eftir at teir í hálvfinaluni høvdu gjørt av við HB Men í finaluni noyddust teir at lúta 5-1 fyri GÍ, eftir at Royn eina løtu hevði verið á odda.

Gylta skeiðið hjá LÌF í bestu deildini var í áttati árunum. Í 1986 vóru teir í steypafinaluni móti NSÍ. Leirvíkingar vóru á odda í steðginum, men teir taptu 2-1. B68 var fyri fyrstu og einastu ferð í finaluni í 1995, og teir taptu greitt fyri HB.

## Leisturin

Tey fyrstu árini var kappingin heldur enn ikki óruddulig.

## Steypafinalur 1955-2004

**Ísafjarðarbikarið**
1955: HB-KÍ 3-1
1956: TB-VB 5-2
1957: HB-KÍ 1-0
1958: TB-HB 5-3
1959: HB-B36 1-0
1960: TB-HB 3-0
1961: TB-B36 2-0
1962: HB-TB 2-1 e.l.l.
1963: HB-B36 7-1
1964: HB-B36 3-3 e.l.l
1964: HB-B36 4-3 e.l.l. (bikarið ogn hjá HB)
**1. Ísafjarðarsúlan**
1965: B36-HB 3-2
1966: KÍ-HB 4-2
1967: KÍ-B36 6-2
1968: HB-B36 2-1
1969: HB-B36 2-0
1970: finalan strikað
1971: HB-TB 9-0
1972: HB-B36 6-1
1973: HB-KÍ 3-1 (súlan ogn hjá HB)
**2. Ísafjarðarsúlan**
1974: VB-HB 4-0
1974: HB-VB 5-3
1975: ÍF-HB 2-5
1975: HB-ÍF 2-2
1976: KÍ-HB 0-1
1976: HB-KÍ 3-0
1977: TB-VB 1-3
1977: VB-TB 0-3
1978: TB-HB 2-1
1978: HB-TB 2-1
1978: HB-TB 3-1
1979: HB-KÍ 5-0
1980: HB-NSÍ 2-0 (súlan ogn hjá HB)
**3. Ísafjarðarsúlan**
1981: HB-TB 5-1
1982: HB-ÍF 2-1
1983: GÍ-Royn 5-1
1984: HB-GÍ 2-0
1985: GÍ-NSÍ 4-2
1986: NSÍ-LÍF 2-1
1987: HB-ÍF 2-2
1987: HB-ÍF 3-0
1988: HB-NSÍ 1-0 (súlan ogn hjá HB)
**1. Løgmanssteypið**
1989: HB-B71 1-1
1989: HB-B71 2-0
1990: KÍ-GÍ 6-1
1991: B36-HB 1-0
1992: HB-KÍ 1-0
1993: B71-HB 1-1
1993: B71-HB 2-1
1994: KÍ-B71 2-1
1995: HB-B68 3-1
1996: GÍ-HB 2-2 e.l.l.
1996: GÍ-HB 5-3
1997: GÍ-VB 6-0
1998: HB-KÍ 2-0 (steypið ogn hjá HB)
**2. Løgmanssteypið**
1999: KÍ-B36 3-1
2000: GÍ-HB 1-0
2001: B36-KÍ 1-0
2002: NSÍ-HB 2-1
2003: B36-GÍ 3-1 e.l.l.
2004: HB-NSÍ 3-1
2005: GÍ-ÍF 4-1

Kappingin um annað Løgmanssteypið verður liðug í 2008. Um einki felag tá hevur vunnið oftari enn onnur feløg, verður hildið fram, inntil eitt felag hevur vunnið oftari enn nakað annað felag. Higartil hava B36 og GÍ vunnið tvær ferðir, og KÍ, NSÍ og HB vunnið eina ferð í part.